Symmetri millum tap og vinning

Ofta hoyra vit bert um tey, sum vinna nógvan pening upp á partabrøv. Tey sum tapa hoyra vit minni um. Í Íløguspælinum er symmetri millum fremsta og aftasta spælara – annar vunnið góð 70 prosent, og hin tapt góð 70 prosent.

ÍLØGUSPÆLIÐ
Hilmar Simonsen

Fert tú inn á www.ilogur.com og hyggur eftir støðuni, so sært tú, at tað er ein merkisverd symmetri ímillum fremsta og aftasta spælara. Í skrivandi stund hevur nummar eitt fingið ein vinning upp á 71 prosent, meðan tann aftasti hevur tapt umleið 78 prosent. Altso hevur fremsti spælarin lagt yvir 700.000 krónur afturat upprunaligu fiktivu upphæddini upp á eina millión, meðan tann aftasti hevur veittrað farvæl til útvið 800.000 krónur.

- Hetta vísir ta sannroynd, at tað er ikki nøkur sjálvfylgja at vinna pening upp á partabrøv. Vit hoyra altíð um tey, sum hava vunnið so og so nógv, meðan minni verður tosað um tey, sum missa. Kanska onkur fær ta skeivu fatan, at bara tú keypir partabrøv, so verður tú ríkur beinanvegin, vísir Jákup Petur Bærentsen, íløgurøktari hjá Kaupthing, á.

Íleggjarar hava skift hugburð

Tað er hent eitt stemningsskifti í partabrævamarknaðunum í seinastuni. Í juli og august lækkaðu partabrøvini sum heild nógv, og kom hetta í kjalarvørrinum á nógv umtalaðu sub-prime lánskreppuni í USA. Men kvartalroknskapir verða lagdir fyri dagin í hesum døgum, og teir vísa sum heild positiv tøl. Harafturat hevur seinasta arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin í USA givið eina góða mynd. Samanlagt hevur hetta gjørt, at vend er komin í á partabrævamarknaðum kring allan knøttin. Marknaðirnir eru hækkaðir nógv seinastu 2 vikurnar, og faktiskt er støðið komið upp á tað sama nú, sum tað var í juli, tá tað annars var uppi á tí hægsta nakrantíð. Í summum førum hava partabrøvini yvirhálað støðið í juli.

Hóast vend er komin í at kalla alla staðni, er heldur trekari niðri í Evropa, men norðurlendsku marknaðirnir hava fylgt væl við góðu gongdini.

Mest áhugavert er tað, at í USA, har partabrævakreppan byrjaði, eru marknaðirnir eisini hækkaðir nógv. Sambært Jákupi Petur Bærentsen ber ikki til at sláa fast, at kreppan er manað niður í jørðina einaferð med alla, men...:

- Vit síggja alt fleiri tekin um, at kreppan er hæsað av á hesum sinni, sigur hann.

Skilja geitir frá bukkum

Serliga peningastovnar og tryggingarfeløg hava tikið dik á seg í hækkingini eftir kreppuna. Men tá fleiri peningastovnar í USA framvegis eru kroystir av teimum problematisku subprime lánunum, hvussu ber tað so til, at hesin sektorur er hækkaður so nógv aftur?

Jákup Petur Bærentsen:

- Tá tað kemur fram, at peningastovnar eru kroystir av truplum lánum, men tað samstundis er óvist, hvørjir peningastovnar talan er um, so velja íleggjarar ta tryggu loysnina og halda seg burtur frá peningastovnum sum heild. Men so hvørt sum roknskapirnir frá peningastovnunum verða lagdir fram, so gerst greitt, hvørjir teir kroystu peningastovnarnir eru, og hvørjir ikki eru. Tá kunnu íleggjarar sálda teir kroystu frá.

Hóast nógv bendir á, at partabrævakreppan er av á hesum sinni, og at íleggjarar eru vorðnir róligir aftur, so er veruleikin at partabrøv hækkaðu nógv fram til juli mánað í ár, tá kreppan kom og gav kursunum eitt kav. Nú eru kursirnir stórt sæð komnir upp á sama støði aftur nú. Tí er tað ringt at spáa um framtíðina.

- Hóast nógv sær positivt út nú, so kann marknaðurin gerast nervøsur aftur, tí hækkingin hevur verið stór, ásannar Jákup Petur Bærentsen.

Gongdin hjá topp 3 (vika 40)



Topp 10 (8. okt. 2007 kl. 10.27)

Leikari	Reiður peningur	Partabrævaogn	Ogn	Avkast
hanna21	214.562,07 kr.	1.497.050,00 kr.	1.711.612,07 kr.	+71,16 %
navijoe	64,44 kr.	1.678.842,00 kr.	1.678.906,44 kr.	+67,89 %
jubiijan	742.062,31 kr.	650.326,46 kr.	1.392.388,77 kr.	+39,24 %
Iacobescu	1.357.847,40 kr.	300,00 kr.	1.358.147,40 kr.	+35,81 %
Friang	22,30 kr.	1.325.587,00 kr.	1.325.609,30 kr.	+32,56 %
GoogleInvest	14,62 kr.	1.276.317,90 kr.	1.276.332,52 kr.	+27,63 %
BONDIN	5.895,50 kr.	1.240.785,50 kr.	1.246.681,00 kr.	+24,67 %
BeintaB	478.669,56 kr.	763.781,06 kr.	1.242.450,63 kr.	+24,25 %
dul	560,99 kr.	1.202.188,00 kr.	1.202.748,99 kr.	+20,27 %
mirjamvitalis	5.659,00 kr.	1.183.914,00 kr.	1.189.573,00 kr.	+18,96 %